Vikuskifti
VIKUSKIFTISBLAÐIÐ HJÁ MIÐLAHÚSINUM | 23. AUGUST 2024 | ÁRG. 98, BLAÐ NR. 33

# Sosialurin

VIKUSKIFTI
35 KR



**Eftir fjórðingsøld í fremstu røð:**

# KAJ LEO TAKKAR FYRI SEG Í POLITIKKI

**Mikudagin fyllir Kaj Leo Holm Johannesen, fyrrverandi løgmaður, 60 ár. Hann hevur skerdan førleika og stríðist við at standa uppreistur. Vit práta við hann um lívið, sjúku og politikk**

Síða 4-5




*Skeinkistøð í Havn:*

## Fegin um at hava opið til klokkan 02




*Flemming Samuelsen:*

## Tvøramaður førir heimsins størstu tvíkilju



# – TAÐ ER NÓGV LÆTTARI

– Politikkur er ikki fyri sartar sálir. Serliga ikki, tá tú kemur upp á toppin, sigur Kaj Leo Holm Johannesen, sum vit hava hitt til eitt prát um tíðina hjá honum í politikki, nú hann verður 60

PÆTUR HJALMAR EVENSSON

Mikudagin 28. august fyllir fyrrverandi løgmaður Kaj Leo Holm Johannesen 60 ár. Í hesum sambandi hava vit sett honum stevnu og fingið hann at taka saman um sína yrkisleið og lív higartil.

*Hvussu er at fylla 60?*

– Tað er fantastiskt. Alternativið er nógv verri. Man skal vera takksamur fyri at koma so langt. Tað er altíð tað fyrsta, man má hugsa um. Tí eg havi upplivað so mikið nógv í lívinum, at hvørja ferð man hugsar aftur á, verður man eitt sindur forskrektur, svarar Kaj Leo Holm Johannesen.

– Jú, eg havi verið nøgdur við lívið upp á allar mátar. Havi havt eitt spennandi lív og havi eisini verið í nógvum rokum. So ja, eg vil siga, at nøgdsemi er tað mest rámandi orðið um kensluna at fylla 60.

Tá Kaj Leo Holm Johannesen tosar um upplivingar og rok, so tosar hann um tíðina sum bæði løgmaður, landsstýrismaður, floksformaður, og sum partur av fótbóltinum, har hann hevur verið bæði landsliðsmálmaður og formaður í HB.

– Sjálvandi, tá man er í politikki, so er rok. Tað er ikki fyri sartar sálir. Serliga ikki, tá tú kemur upp á toppin. Og tað veit man, tá man er í politikki. Tað er nógv lættari at vera indianari, men heilt nakað heilt annað at vera høvdingur.

***Tað gekk skjótt fyri seg, men sjólívið lærdi meg nógv um lívið og arbeiðsdisiplin***

Kaj Leo Holm Johannesen tók fyrstu ferð sæti á tingi í 1996 sum eykamaður fyri Sambandsflokkin, men í 2002 bleiv hann fyrstu ferð valdur á ting við 262 persónligum atkvøðum. Áðrenn hetta var hann eisini býráðslimur í Tórshavnar kommunu frá 1997 til 2000.

Á heysti í 2008 bleiv Kaj Leo Holm Johannesen løgmaður í einari ABC-samgongu. Tað gloymir hann ikki.

– Størsta upplivingin hjá mær, tað var tá eg bleiv løgmaður. Tað vóru harðar tíðir og stórt hall á fíggjarlógini, bankarnir fóru á heysin og fiskasølan við.

– Tí var eisini eg øgiliga spentur um, hvussu mítt úrslit fór at blíva á løgtingsvalinum 2011. Eg bleiv so øgiliga glaður, tá eg fekk metstórt tal av atkvøðum, heili 1979 persónligar atkvøður, aftaná at hava sitið í landsstýrinum sum løgmaður í hálvtfjórða ár. Eg føldi tá, at eg fekk eina takkarløn frá veljaranum fyri tað ræðuliga stríðið frá 2008 til 2014. Tað vóru ikki bara stuttligar tíðir, sigur Kaj Leo Holm Johannesen.

– Eg gloymi aldrin talið 1979, tí tað var árið, eg fór til skips við Váðasteini sum 14 ára gamal. Eg stakk av í 7 flokki.

## Vildi royna sjólívið

*Ja, hví fórt tú yvirhøvur til sjós?*

– Eg helt, at eg skuldi royna sjólívið. Eg var kanska eitt sindur óróligur og skúlatroyttur. Kanska man hevði koyrt ADHD á meg, um tað var í dag. Men tá fóru nógvir ungir menn til skips. Tað var ein inngongd til lívið, fortelur hann.

Aftaná at hava siglt við Váðasteini í fýra ár, fór ungi havnamaðurin á stýrimansskúla. Hann gjørdist liðugur sum skipsførari og mynstraði sum 21 ára gamal stýrimaður á stórum bingjuskipi hjá Maersk Line.

– Tað gekk skjótt fyri seg, men sjólívið lærdi meg nógv um lívið og arbeiðsdisiplin, sigur Kaj Leo.

Áðrenn hann nøkur ár seinni fór upp í politik, arbeiddi hann á Føroya Fiskasølu, og hann hevði eisini egna fyritøku. At hann síðani skuldi enda í politikki, var ikki nakað, sum beinleiðis lá í kortunum.

– Eg bleiv biðin um at stilla upp av einum kendum vinnulívsmanni á Oyri, sum tá var í nevndini í Føroya Fiskasølu, tað var Edmund Joensen. Tá segði eg ja. Tað var kanska fyri at royna at gera okkurt betur í samfelagnum.

*Sum politikari hevur tú roynt tað mesta. Men er tað nakað, tú ert serliga stoltur av politiskt?*

– Tað er ringt bara at nevna eitt ting. Men eg var ræðuliga glaður, tá vit bjargaðu Norrønu. Vit høvdu ikki meiriluta og máttu arbeiða bæði dag og nátt fyri at fáa meiriluta til at seta 30 milliónir í Norrønu, so hon ikki skuldi fara av landinum. Tað var nokk ein tann besta íløgan, vit nakrantíð hava gjørt fyri føroyska ferðavinnu, sigur Kaj Leo Holm Johannesen.

*Er tað nakað, tú ert minni stoltur av?*

– Sjálvandi eru tað nógv ting, men eg dugi ikki at nevna nakað einstakt. Eg havi havt ábyrgd av at lagt fleiri hundrað lógaruppskot niðan í tingið. Aftanfyri tey fara tað altíð at vera nøkur trupul og keðilig ting.

# – Hetta ynski eg ikki fyri nakran

***– Hevði onkur fyri trimum árum síðani sagt mær, at eg skuldi nærkast einum rullistóli, so veit eg, hvat eg hevði sagt tá, sigur Kaj Leo Holm Johannesen, sum stríðist við at standa uppreistur.***



Lívið og tilveran hjá Kaj Leo Holm Johannesen er nógv broytt seinastu tvey árini. Hann hevur trupult við at ganga og brúkar tí hjálpitól. Diagnosan eitur CIDP og er ein sokallaður auto immunur tilstandur.

– Eg hevði ein skaða í rygginum frá fótbóltinum, sum hevur vitjað aftur av og á. Til endans var tað blivið so keðiligt, at eg lat meg skurðviðgera. Tveir diskar trýstu og ávirkaðu nervar niður í beinið, fortelur hann.

Operatiónin eydnaðist væl, men hann hevur í dag skerdan førleika.

– Eg havi onga pínu. Men eg gangi ólmindiliga illa. Eg havi tað, man kann kalla skerdan førleika. Tað kalla tey fak-kønu tað í øllum førum, sigur Kaj Leo.

Tað hevur við sær, at hann stríðist við at standa uppreistur, og trappur klárar hann illa.

– Hevði onkur fyri trimum árum síðani sagt mær, at eg skuldi nærkast einum rullistóli, so veit eg, hvat eg hevði sagt tá. Men tað sigi eg ikki í dag. Tíbetur er hetta ikki lívshóttandi.

Kaj Leo hugsar, at upprunin til sjúkuna er ryggskaðin, sum er komin frá hansara tíð sum málmaður í fótbólti.

– Eg byrjaði at kasta meg sum 7 ára gamal. Tá var tað grúsvøllur, so eg bløddi til næstan hvørja venjing. Tað var hart fyri likamið, og tað betalir man so ein prís fyri í dag. Men eg hevði ikki viljað verið ta gleðina og tann kammeratskapin frá fótbóltinum fyri uttan, sigur hann og leggur aftrat:

– Eg hevði ikki klárað at kastað meg í dag.

## Mentalt hart, men takksamur

Sjúkralegan og lívsbroytingin hevur verið strævin fyri roynda politikaran, sum annars altíð hevur verið aktivur og fullur av lívi.

– Sjálvandi er tað ein kampur. Tað er ræðuliga strævið. Hetta ynski eg ikki fyri nakran, sigur hann.

– Tíðin frá tú kanst gera alt, til tú skalt ganga á høkjum, hon er øgiliga mentalt hørð. Tað krevur nógv av tær, at tú ert væl fyri, og at tú heldur humørið høgt og gleðina intakta.

Og tað má man siga, at Kaj Leo ger – tí lyndið er sum altíð positivt, og hann sær hvørja løtu sum eina gávu.

– Eg eri uppvandur við at vera takksamur við tað eg havi og gera mítt besta, og tað geri eg. Tað eru altíð fleiri møguleikar enn forðingar. Tí velji eg bara at síggja hetta sum avbjóðing, sum er til at loysa. Tí tá tú hevur avbjóðing, so loysir tú hana.

– Eg vóni, at tað verður betri. Men um man hugsar realistiskt, so kann tað eisini blíva verri. Tá kann man tosa um at vera avlamin. Og so má man planleggja lívið út frá tí.

# AT VERA INDIANARI



Myndir: Álvur Haraldsen

## EG STILLI IKKI UPP AFTUR

*So er spurningurin - hvussu sær framtíðin út hjá Kaj Leo Holm Johannesen í politikki?*
– Eg havi trivist óalmindiliga væl í poltikki. Men einaferð verður man jú mettur. So eg fari ikki at stilla upp aftur í politikki. Tað fari eg ikki, sigur hann.
– Við teimum avbjóðingum, eg havi, so er tað minni hugaligt at vera í politikki.
– Men ikki bara tað. Tí tá tú hevur verið í politikki í 25 ár, so er spurningurin eisini, um tað ikki er nokk.
Tað er best at lata yngri kreftir sleppa framat.
*Hevur tú nakað ráð til yngri politikarar?*
– Ja, koyr full speed ahead. Halt avtalur og ver erligur um øll ting. Ver rættvísur og spæl fair play. Akkurát sum í ítróttinum. Og um man er egnaður, jamen so kemur man kanska upp á toppin, sigur Kaj Leo Holm Johannesen.